


> *Arbeiðið verður skipað soleiðis, at hetta skal nerva skúlagongdina sum minst. Hon kemur ongatíð at steðga sum so*
>
> *(Kristian Jacobsen, byggimeistari)*

> *Hóast tað bert eru 50 næmingar í skúlanum nú, er hann nærum ov lítil*
>
> *(Júst Poulsen, borgarstjóri)*



*- Hetta er ein íløga í framtíðina, sigur borgarstjórin, Júst Poulsen (vinstrumegin). Fyritøkan hjá Kristiani Jacobsen stendur fyri arbeiðinum*
*Mynd: Høgni Thomsen*

# Stór íløga fyri framtíð



*Skúlin er liðugur fyri í dag. "Í morgin" verða umstøðurnar enn betri*
*Mynd: Høgni Thomsen*

**Skúlin á Fossánesi verður í hesum døgum útbygdur fyri einar 7 mió krónur. – Hetta er ein íløga til verandi næmingar og næmingar í framtíðini, sigur Júst Poulsen, borgarstjóri í Hvannasunds kommunu**

SKÚLI
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Norðdepil:** Fyrrapartin í gjár var skúlagongd sum vanligt í skúlanum á Fossánesi.

Børnini eru so líðandi vorðin von við, at handverkarar arbeiða og halda nakað av gangi uttanfyri. Tey vita – sum vituligt er - at hetta er eitt tíðaravmarkað arbeiði.

Tey kunnu gleða seg um at tey í framtíðini fáa munandi betri umstøður við nýggjum skúlastovum og øðrum hentleikum. Síðani verður hildið fram við at nútíðargera tann gamla skúlan.

- Í dag er støðan hon, at tú mást hava øgiliga góðar umstøður innan skúlagáttina. Og tað er júst tað sum vit royna at gera her í kommununi.

- Okkara ynski er, at geva okkara børnum ein so góðan skúla sum yvirhøvur gjørligt, staðfestir Júst Poulsen.

Skúlin á Fossánesi varð tikin í nýtslu í 1983.

## Fyri alla familjuna

Ein høvuðsorsøkin til at kommunan nú er farin undir at byggja út henda 24 ára gamla skúlan er nógva tosið um skúlar, skúlaskipan og PISA-kanningar.